# Taliban vil hava hjálp

**Taliban-stýrið í Afghanistan krevur nú, at ST skal hjálpa teimum nógvu neyðstøddu afghanunum, so sleppast kann undan einari veruligari menniskjavanlukku**

Tað var afghanski sendiharrin í Pakistan, sum kom við áheitanini á heimsfelagsskapin.

– Veturin stendur fyri durum. Tí krevja vit, at ST hjálpir afghanska fólkinum í sjálvum Afghanistan, segði sendiharrin í Islamabad mánadagin.

Áheitanin ella kravið frá sendiharranum er ikki í samsvari við tað, sum yvirgangsmaðurin Osama bin Laden hevur sagt um ST í teimum sjónbondum, sum hann hevur sent út í seinastuni. Har hevur bin Laden m. a. sagt, at eingir muslimar eiga at samstarva við ST, tí heimsfelagsskapurin er eitt amboð hjá brotsmonnum.

– ST hevur verið upprunin til allar tær vanlukkur, sum hava verið okkum muslimum fyri. Eingin muslimur eigur at hava nakað við ST at gera, segði bin Laden í seinastu sjónbandsrøðu síni.

ST-embætismenn siga, at hjálpararbeiðið í Afghanistan er nógv darvað av amerikansku bumbuálopunum. Harafturat kemur, at Taliban-stýrið leggur lítið í arbeiðið hjá ST-hjálparfólkunum, sum m. a. hevur sera avmarkaðar møguleikar fyri samskifti.




## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:** Gul av landnyrðingi, seinnapartin veksur hann vindin upp í hvassan vind av norði. Kavaælingur, men eisini sólglottar og hitalagið um frostmarkið, um náttina niður í ÷4 stig.




**Veðrið hósdagin:** Hann minkar vindin niður í lot av ymsum ættum og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitalagið millum frostmarkið og ÷3 stig, um náttina niður í ÷ 6 stig.




**Veðrið fríggjadagin:** Hann veksur vindin upp í hvassan vind ella skrið av suðri og regn. Hitin kemur upp í eini 10 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:** Skrið ella stormur av útnyrðingi og kavaælingur. Hitin um frostmarkið. Sunnudagin minni vindur og yvirhøvur turt. Hitin kemur upp í eini 5 stig.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | ÷13 |
| Nuuk | 0 |
| Qaqortoq | 2 |
| Ammassalik | ÷5 |
| Saint John's | – |
| Halifax | – |
| Reykjavík | 2 |
| Seyðisfjørður | 0 |
| Tórshavn | 4 |
| Lerwick | 3 |
| Aberdeen | 4 |
| London | 10 |
| Tromsø | ÷3 |
| Bergen | 1 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 3 |
| Keypmannah. | 8 |
| Helsinki | 0 |
| Moskva | 1 |
| Berlin | 8 |
| Warzawa | 7 |
| Kiev | 5 |
| Bukarest | 9 |
| Paris | 11 |
| Madrid | 13 |
| Róm | 18 |
| Malorca | – |
| Athen | 17 |
| Malta | 19 |
| Tunis | 22 |
| Beijing | 11 |
| New Dehli | 27 |
| Bangkok | 34 |
| Jakarta | 32 |
| Sydney | – |
| New York | 10 |
| Miami | 21 |
| Los Angeles | 17 |
| Meksikobýur | – |
| Panama | 29 |
| La Paz | 16 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 22 |

## LUFTTRÝSTIÐ




Eitt lágtrýst, 1002 hPa. millum Íslands og Føroya fer í landsynning.




Lágtrýstið sunnan fyri Føroyar fer í landsynning og hevur kalda luft við sær á okkara leiðum.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 05/11 kl. 06[00] – 06/11 kl. 06[00]. Hitin í gjár: 3,2°
Minsti hiti máldur í nov.: ÷7,2° Mesti hiti máldur í nov.: 12,2°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 1,0 mm – mált frá 05/11 kl. 06[00] – 06/11 kl. 06[00]
Avfallið higartil í november: 35,1 mm

## VESTFALLSKYRRINDI

1. nov.: Fullmáni
8. nov.: Seinna kvarter
11. nov.: Mánin næstur jørðini

Kelda. Álmanakkin 2001

| Dagur | Suðuroyar-/Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 7. nov | 11.07 | 23.47 | 10.07 | 22.47 | 10.22 | 23.02 | 00.40 | 13.07 | 01.40 | 14.07 | 09.22 | 22.02 | 08.22 | 21.02 | 11.22 | — | — | 12.22 | 10.52 | 23.32 | — | 12.07 |
| 8. nov | — | 12.28 | 11.28 | — | 11.43 | — | 01.47 | 14.28 | 02.47 | 15.28 | 10.43 | 23.21 | 09.43 | 22.21 | 00.02 | 12.43 | 01.02 | 13.43 | — | 12.13 | 00.47 | 13.28 |
| 9. nov | 01.06 | 13.45 | 00.06 | 12.45 | 00.21 | 13.00 | 03.06 | 15.45 | 04.06 | 16.45 | — | 12.00 | 11.00 | 23.24 | 01.21 | 14.00 | 02.21 | 15.00 | 00.51 | 13.30 | 02.06 | 14.45 |
| 10. nov | 02.09 | 14.33 | 01.09 | 13.33 | 01.24 | 13.48 | 04.09 | 16.33 | 05.09 | 17.33 | 00.24 | 12.48 | 11.48 | — | 02.24 | 14.48 | 03.24 | 15.48 | 01.54 | 14.18 | 03.09 | 15.33 |

www.sosialurin.fo

fk

…hvør sigur at vit eru sum onnur?
Dvørgastígur 7
100 Tórshavn
tel 31 45 55
fax 31 80 26
hestoy@hestprent.fo
HESTPRENT Spf.

5 707265 100036 >